# Tökni lærir Saudi-arabarar at finna olju

TÍPINDASKRIV

Í august í ár luttóku 22 lesandi frá Saudi Arabia á einum 3-daga Xplore skeiði í oljuleiting, sum fyritøkan Tökni í Havn skipaði fyri.

Xplore skeiðið var partur av einum "summar universiteti" á Robert Gordon University í Aberdeen. Endamálið við Xplore skeiðnum var at geva luttakarunum eina heildarmynd av frálanda oljuleiting.

Afturmeldingarnar frá luttakarunum vóru sera jaligar, og tað var eyðsýnt, at teir lærdu eina rúgvu um oljuleitingarvinnuna.

Teir lesandi eru stuðlaðir av SaudiAramco, ið er tað oljufelagið, sum framleiðir mest olju í heiminum.



*Eitt av teimum 7 luttakandi liðunum á Xplore skeiðinum á Robert Gordon University í Aberdeen í august 2003*


Sosialurin
www.sosialurin.fo



# Virkisleiðari

P/F Føroya Fiskavirking søkir eftir virkisleiðara til virkið í Miðvági. Virkisleiðarin hevur ábyrgd av framleiðslu, rakstri, menning og umsiting av virkinum í Miðvági. Virkisleiðarin myndar virkið úteftir.

P/F Føroya Fiskavirking Miðvági virkar serliga hýsu og upsa. Um summarið virkar virkið serliga gullaks. Vørurnar, ið virkaðar verða, eru á høgum góðskustigi og fevna um m.a. catering- og retailvørur eins og frystar ídnaðarvørur. Arbeiði á Fiskavirking í Miðvági fer fram sambært innaneftirlitsskipan, sum er góðkend av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Í 2002 virkaði virkið um 5.400 tons av rávøru.

**Uppgávurnar hjá virkisleiðaranum eru m.a.:**
- Leiða arbeiði á Fiskavirking í Miðvági.
- Gera dag- og vikuroknskapir
- Gera rakstrarætlan
- Samstarv við søludeild og samskifti við keyparar av vørunum.
- Samstarv um keyp av rávøru.
- Samstarv við høvuðsleiðslu og aðrar virkisleiðarnar.

**Ynskiligt er at umsøkjarin hevur hesar førleikar:**
- Viðkomandi útbúgving á hóskandi støði.
- Kunnleika til og royndir innan framleiðslu av fiski.
- Leiðslueginleikar.
- Góðan málkunnleika.
- Góðan samstarvs- og samskiftiseginleika.

Vit bjóða eitt starv í einum mennandi og spennandi umhvørvi við góðum umstøðum. Løn eftir nærri avtalu.

Nærri upplýsingar um starvi fáast frá Meinhard Jacobsen ella Leivur Michelsen á tel. 355555.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Skrivlig umsókn verður at senda í seinasta lagi 2. oktober til:

UNITED SEAFOOD
P/F Føroya Fiskavirking
att : Meinhard Jacobsen ella Leivur Michelsen.
Postboks 218
110 Tórshavn

P/F Føroya Fiskavirking
Vestara Bryggja
P.O. Box 218
110 Tórshavn
Tel: 35 55 55
Tel: 35 55 50
www.united.fo

UNITED seafood




Ein hjartans tøkk verður veitt tykkum, sum vóru við til at gera hjúnabandsdag okkara 17. mai 2003 ógloymandi.

**Lisbeth & Jóannes Næs**



Øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu okkum á hjúnabandsdegnum 05. juli 2003, takka vit hjartaliga.

**Annelisa & Jens Kristian**

## Tøkk

Øllum tykkum, sum gleddu meg við gávum, blómum og telegrammum, og sum vóru við til at gera mær 70 ára føðingardagin so hugnaligan, takki eg hjartaliga.

**Pauli Vang**



# Eitt afturstig fyri javnstøðuna



*Rætturin hjá pápum at vera heima í barnsburðarfarloyvi skal skerjast, stendur tað til Bjarna Djurholm landsstýrismann.*

*Mynd: Jens K. Vang*

**Tað fær stórar avleiðingar fyri barnið, um rætturin hjá pápum at vera heima hjá sínum nýfødda barni verður skerdur fyri at spara Barsilsskipanini pening, sigur Javnstøðunevndin**

BARNSBURÐUR
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Javnstøðunevndin fer á barrikadurnar. Hesaferð fyri at verja menn. Ella rættari pápar. Orsøkin er, at Barsilsskipanin er í peninganeyð og fyri at spara pening, ætlar Bjarni Djurholm landsstýrismaður millum annað at skerja møguleikan hjá pápum at vera heima hjá barninum fyrstu tíðina.

Sum er kunnu allir pápar vera heima saman við mammuni fyrstu fjúrtan dagarnar av lívinum hjá nýfødda barninum. Fyrstu 12 vikurnar skal mamman vera heima hjá barninum, men næstu 10 vikurnar eftir tað kunnu mamman og pápin býta sínámillum.

Sum er, er lønarendurgjaldið 100 prosent. Hagtøl hjá Barsilsskipanini vísa, at útgjaldið til menn er munandi hægri enn til kvinnur, og tí sær landsstýrismaðurin tað sum ein upplagdan sparimøguleika at skerja rættin hjá monnum at fara heim til barnið.

Tað hóvar ikki forkvinnuni í Javnstøðunevndini, Anniku Wardum Joensen.

– Eg skilji tað als ikki, tí hetta fær stórar avleiðingar. Allar kanningar og øll vitan vísir, at tað er best fyri barnið, um tað bæði hevur eina mammu og ein pápa rundan um seg. Pápar eru eins góðir til umsorgan, hóast teir sjálvandi ikki kunnu geva bróst. Men í Føroyum skulu pápar eftir øllum at døma ikki hava hendan møguleikan, og tað tú tekur frá pápum og mammum, tekur tú eisini frá barninum, sigur Annika Wardum Joensen.

Javnstøðunevndin fegnast annars um, at vit hava fingið eina Barsilsskipan, tí hon er eitt stórt framstig fyri javnstøðu, men hon harmast um, at hvørja ferð skipanin verður broytt, er tað til tað verra.

Seinast skipanin varð broytt, heitti Javnstøðunevndin á politikarar um at áseta eina pápakvotu, sum datt burtur, um menninir ikki fóru heim til barnið eina tíð. Tá var talan um at økja skipanina úr hálvum upp í eitt ár, men eingir pengar fylgdu við og eingin pápakvota varð ásett, og tí broytti tað lítið um mynstrið. Annika Wardum Joensen vísir í staðin til íslendsku skipanina sum eina fyrimynd.

– Í Íslandi, har lønarendurgjaldið er 80 prosent, kunnu kvinnur taka tríggjar mánaðir, pápar tríggjar mánaðir og síðan hava tey tríggjar mánaðir afturat at býta sínámillum. 85 prosent av pápunum taka gleðiliga av og eru heima í barnsburðarfarloyvi. Men í Føroyum vilja okkara politikarar ikki geva familjuni hendan møguleika, og tað vísir, at samgongan og løgtingið ikki vilja føra javnstøðupolitikk. Tann skerjingin, sum nú hendir í staðin, er eitt álvarsligt afturstig fyri javnstøðuna her á landi, sigur Annika Wardum Joensen.

# Barsilsskipanin í dýrastu neyð

**Barsilsskipanin skal spara. Tað er greitt, nú játtanin í ár ikki heldur, og fíggjarætlanin næsta ár er skotin langt undir málið. 15 milliónir krónur vanta í ár og 22,5 milliónir krónur næsta ár. Lægri útgjald, styttri útgjaldsskeið og hægri inngjald verða umhugsað**

BAKGRUND
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Barsilsskipanini tørvar 15 milliónir krónur afturat í ár, um hon skal klára at gjalda hvørjum sítt. Tað vísir eitt bræv, sum barsilsskipanin hevur sent Vinnumálaráðnum við umbøn um eina eykajáttan í ár og hægri játtan næsta ár.

Sostatt hava útrokningarnar rakt fullkomiliga skeivt fyri hetta árið. Upprunaliga var mett, at Barsilsskipanin skuldi gjalda 56,3 milliónir krónur í ár, men útrokningarnar vísa, at skipanin helst fer at gjalda oman fyri 70 milliónir krónur, tá av tornar.

Fleiri fortreytir hava víst seg øðrvísi, enn Barsilskipanin hevði væntað. Eitt nú eru væl fleiri børn komin inn í skipanina, enn fíggjarætlanin gekk út frá. Lønarhækkingar, tal av fólkum í skipanini og býtið millum mammur og pápar hava eisini ávirkað útgjaldið.

Næsta ár verða eisini trupulleikar. Barsilsskipanin hevði mett, at skipanin væntandi skuldi gjalda 63 milliónir krónur í 2004, men broyttu umstøðurnar gera, at útgjaldið helst verður einar 75 milliónir krónur, um lógin verður óbroytt. Men tað verður hon neyvan, tí landsstýrið er ikki sinnað at rinda meira til barsilsskipanina næsta ár enn tær 52,5 milliónir krónurnar, sum er sett av í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2004.

### Skerdir pápar

Útvarp Føroya hevur gjørt nógv burturúr málinum hesa vikuna, og bæði Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við arbeiðsmarknaðarmálum, og Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, hava ført fram, at skipanin má broytast.

Stendur tað til Bjarna Djurholm, verða tað menninir og tey hægst løntu, sum skulu bøta fyri, at skipanin ikki heldur fíggjarætlanina. Bjarni Djurholm hevur sagt við Útvarpið, at møguleikin hjá pápum at fara í farloyvi helst verður skerdur, og hámarkið fyri útgjaldi, sum í dag er 35.000 krónur, verður lækkað.

Karsten Hansen sigur, at skipanin skal vera sjálvfíggjandi, við tað at arbeiðstakarar og arbeiðsgevarar skulu fíggja skipanina. Sum er rinda partarnir á arbeiðsmarknaðinum einar 30 milliónir krónur til Barsilsskipanina. Restin kemur inn við skatti. Sostatt skal arbeiðsmarknaðurin rinda uppaftur meira, stendur tað til Karsten Hansen, men tað verður neyvan uttan svørðslag.

### Lægri útgjald - hægri inngjald

Barsilsskipanin nevnir sjálv fleiri uppskot til eina loysn á fíggjarligu trupulleikunum. Minni útgjald, hægri inngjald, lægri loft og styttri tíð eru nevnd sum loysnir.

Sum er gevur 0,25 prosent av lønini í inngjaldi frá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum einar 29 milliónir krónur í 2004. Barsilsskipanin sigur, at verður hetta talið hækkað upp í 0,44 prosent, so er trupulleikin loystur, tí so koma 51 milliónir krónur í kassan frá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, og restin kann fíggjast við somu upphædd frá landskassanum. Verður inngjaldsprosentið onkustaðni harímillum, verður inntøkan samsvarandi minni. Verður útgjaldið minkað, so at lønarútgjaldið verður 70 prosent í staðin fyri 100 prosent, so sparir Barsilsskipanin 22,5 milliónir krónur. Hinvegin ger tað ikki so stóran mun at lække hámarkið. Verður hámarkið lækkað úr 35.000 krónum niður í 25.000 krónur sparir skipanin 2,5 prosent.

Hvussu verður og ikki. Fleiri møguleikar eru, og tað er ein politiskur spurningur, hvør loysn verður seymað saman.

### Fakta

Sparimøguleikar hjá Barsilsskipanini:
- at minka um lønarendurgjaldið við at seta tað til eitt nú 80 prosent eins og fleiri lond kring okkum hava
- at lækka hámarkið, sum er 35.000 krónur
- at minka um útgjaldstíðarskeiðið hjá mammum og pápum
- at Barsilskipanin ikki rindar frá 13. viku til 4. viku undan føðing